

*Halldór Ásgrímsson*

# Forsætismálaráðharrin hevur orðið

Í bók sínari Oyggjarnar átjan sigur Hannes Pétursson, skald, at ongastaðni er ein íslendingur minni útlendingur enn í Føroyum. Hjartalagið og lyndið eru so átøk og samfeløgini í mangar mátar lík, men tað ið mest um ræður er tó, at eingin íslendingur kann vera í iva um, at í Føroyum gistir hann eina vinatjóð.

Illa ber annað til enn at taka undir við skaldinum. Ísland og Føroyar eru sannar vinatjóðir og ongum so nær skyld í máli, mentan og siðvenju sum hvørjum øðrum. Hesi seinastu árini eru samskiftini millum londini vaksin í stórum, serliga tá ið um handil og vinnu ræður. Íslendskar fyritøkur hava merkt sær spor í vøll í Føroyum og landnámið, sum Jákup Jacobsen gjørdi, tá ið fyrsti Skemmuhandilin læt upp í Íslandi í 1987, er alkent.

Frá 1993 hevur ein sáttmáli verið gildi millum Ísland og Føroyar, sum loyvir fríhandil við ídnaðarvørum og fiskaframleiðslu. Tætta sambandið millum londini og góður vilji til at menna handilssamstarvið víðari gjørdi, at ein víðtøkur handilssáttmáli varð undirskrivaður í Hoyvík í august mánaði í fjør.

Endamálið við Hoyvíkssáttmálanum er at fáa í lag eitt felags búskaparøki í umveldinum hjá Íslandi og Føroyum, og sáttmálin fevnir millum annað um handil við vørum og tænastu, um pengaflutning, íløgur og frælsið hjá fólki at fara ímillum. Eisini ásetur sáttmálin, at íslendingar og íslendskar fyritøkur skulu hava somu rættindi í Føroyum sum føroyingar og føroyskar fyritøkur - og øvut. Líkt er til, at sáttmálin fær fult gildi, áðrenn langt um líður. Hetta er víðtøkasti handilssáttmáli, sum Ísland nakrantíð hevur gjørt og tí hóskar tað seg eisini, at sáttmálin er gjørdur millum Ísland og Føroyar.

At fara á odda fyri eini handilssendinevnd til Føroya nú samskiftini millum londini standa í einum tíðarskifti høvir tískil væl og er mær bæði ein heiður og ein gleði. Tær fyritøkurnar, sum eru við í ferðini, eru av ymsum slag, men hava tað allar felags, at tær vilja kunna seg betur um føroyskt vinnulív og teir møguleikar, sum har kunnu vísa seg.

Tað er tí vón mín og mítt álit, at vitjan okkara í oyggjunum átjan fer at menna samskiftini og vinarlagið millum Føroyar og Ísland nú og framtíðini.